# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tøgnin drepur. Vit kunnu ikki sita tigandi og eygleiða neyðina í Darfur. Vit mugu gera okkurt*

*(Nicolas Sarkozy)*

# Illveður í Bretlandi kravt trý mannalív




*Í Sheffield stendur ein stórur partur av býnum undir í vatni*

**Tað hevur regnað óvanliga illa í pørtum av Onglandi og í Wales, og fleiri túsund fólk eru rýmd frá húsi og heimi.**

Hóast veðurmenninir høvdu sagt frá nógvum regni, kom tað ógvusliga avfallið púra óvartá fólk og myndugleikar. Einasti uggin er, at veðurmenninir væntandi hava rætt, nú teir hava sagt frá minni avfalli út á dagin.

Í gjárkvøldið bleiv ein 14 ára gamal drongur funnin druknaður í Sheffield, og í Hull doyði ein 28 ára gamal maður, tá hann royndi at reinsa eina kloakk. Seinni varð ein 68 ára gamal maður funnin deyður í Sheffield. Tað vísti seg, at hann var druknaður, tá hann royndi at sleppa tvørtur um ein veg, sum stóð undir vatni.

Í Rotherham í South Yorkshire fóru fólk at stúra fyri, at Ulley-vatnbyrgingin fór at skrædna orsakað av tí ógvusliga avfallinum. Myndugleikarnir tóku eisini málið í størsta álvara, og fleiri hundrað fólk vóru flutt burtur frá byrgingini. Tey hava síðani hildið til í einum skúla, sigur Sky News.

Tað mesta regnið var kring býin Sheffield. Har noyddust fleiri fólk at leita sær upp á húsatekjur ella út á altanir undan vatninum, og myndugleikarnir sendu fleiri tyrlur at taka fólk upp.

Bretsku veðurmenninir siga, at við Sheffield kom so nógv regn niður eftir nøkrum fáum tímum, at tað svaraði til tað, sum vanliga kemur niður eftir einum mánað. Men veðrið batnar í dag, siga veðurmenninir, sjálvt um tað verður óstøðugt alla vikuna.

# Cameron bjóðar Brown av

**Konservativi floksformaðurin bjóðar nýggja Labour-leiðaranum av beinanvegin**

- Meinar Gordon Brown tað, tá hann sigur, at hann ætlar sær at lurta eftir fólkinum, so eigur hann at skriva út parlamentsval alt fyri eitt, sigur tann konservatiuvi floksformaðurin, David Cameron, við blaðið Evening Standard.

Cameron sigur eisini, at eftir hansara tykki er tað skeivt av Gordon Brown at taka við sum forsætisráðharri eftir Tony Blair í morgin.

- Fólkið hevur ikki valt hann til forsætisráðharra, so hann hevur onga heimild til at taka við, sigur David Cameron, sum heldur ikki væntar, at Gordon Brown verður tann broytingin, sum bretum tørvar.




*David Cameron vil hava val alt fyri eitt*

## STUTT SAGT

## Møtir ikki

Thaksin Shinawatra, sum bleiv koyrdur frá sum forsætisráðharri í Teilandi í september í fjør, ætlar sær ikki at møta í rættinum í Bangkok, har hann er ákærdur fyri svik. Tað var herurin, sum koyrdi forsætisráðharran frá, og hernaðarstjórnin hevur biðið Shinawatra koma heim, so hann kann verja seg. Men fyrrverandi forsætisráðharrin, sum býr í London, sigur, at hann fer ikki heimaftur. Stýrið í Bangkok hevur svarað, at so fer Teiland at krevja hann útflýggjaðan úr Bretlandi.

## Norðurkorea fær rís

Í fjør segði Suðurkorea seg vera til reiðar at lata grannanum fyri norðan, Norðurkorea, 400.000 tons av rísi, men hjálpin bleiv steðgað, tá norðurkoreanska stjórnin sýtti fyri at gevast við sínum kjarnorkuætlanum. Nú hevur Norðurkorea slakað og hevur játtað at steðga øllum virkseminum á kjarnorkuøkinum, og embætismenn hjá altjóða kjarnorkustovninum eru komnir til landið fyri at tryggja sær, at stjórnin heldur lyftið. Tann broytta norðurkoreanska kósin ger eisini, at landið nú fær tey 400.000 tonsini av rísi frá grannanum.

## Funnu gamla drotning

Fornfrøðingar halda seg við vissu hava funnið leivdirnar av teirri søguligu, egyptisku drotningini Hatshepsut í einum stórum gravstaði í Konganna dali. Sagt verður, at hetta er ivaleyst tann størsta hendingin av hesum slagnum, síðani leivdirnar av konginum Tutankhamon vórðu funnar. Hatshepsut ráddi fyri borgum í Egyptalandi frá 1503 til 1482 fyri Kristi føðing.